## Hvussu kann eg fáa samdøgursrehabilitering?

Til ber at søkja um samdøgursrehabilitering við at útfylla umsóknarblaðið, sum finst á heimasíðuni **www.nbh.fo.**

Gjaldið er kr.134,- um samdøgrið, og rokning verður send, tá ið tíðarskeiðið er lokið.

Eftir at umsóknin er móttikin, seta vit okkum í samband við teg fyri at tosa nærri um tilboðið.

Ert tú í iva um okkurt ella hevur spurningar ber til at venda sær til rehabiliteringstoymið á tlf. 793415/ 793460, gerandisdagar millum kl. 8-15, ella senda teldupost til **rehab@nbh.fo.**

NORÐOYA
BÚ- OG HEIMATÆNASTA


**Norðoya Bú- og Heimatænasta**
Nólsoyar Pálsgøta 32
Postsmoga 2
710 Klaksvík


NORÐOYA
BÚ- OG HEIMATÆNASTA

# Samdøgursrehabilitering




## Sambýlið á Heygnum

## Ven og Virka

## Hvat er Samdøgursrehabilitering?

Samdøgursrehabilitering er eitt endurmenningartilboð til heimabúgvandi fólkapensjónistar í Norðoyggjum, sum hava mist likamligan ella sálarligan virkisførleika og hava ynski um at endurvinna førleikarnar at megna gerandisdagin aftur á best møguligan hátt.

Eitt tvørfakligt toymið við ergoterapeutum, fysioterapeutum, sjúkrarøktarfrøðingi stuðla tær saman við røktarstarvsfólkum at røkka tínum málum.

Saman við tær seta vit, við støði í tínum ynskjum, mál fyri uppihaldið og leggja eina ætlan, sum ítøkiliga lýsir, hvussu farast skal fram.




## Sambýlið á Heygnum og Ven og Virka

Tú kemur at gista á **Sambýlinum á Heygnum**, har tvey pláss eru sett av til samdøgursrehabilitering.

**Ven og Virka** er venjingarhølið hjá Norðoya Bú- og Heimatænastu við nútímans útgerð, har tú fert at venja likamliga venjing hvønn dag saman við fysioterapeutum og ergoterapeutum.



Venjingarnar kunnu eisini snúgva seg um, hvørji áhugamál tú hevur, hvørji hjálpartól tú hevur tørv á, hvørjar gerandisførleikar tú hevur tørv á at venja o.a.

Í tilgongdini verður samskift javnan við møgulig avvarðandi, og aftaná 14 dagar verður ein miðvegissamrøða saman við tær, avvarðandi og rehabiliteringstoyminum, har tosað verður um, hvussu gongur, hvat meiri kann verða gjørt, og nær tú kann fara heim.